VIÐMERKINGAR

# Í Føroyum skulu føroyingar ráða

**Elsa í Garði**
*Fólkaflokksvalevni í Suðurstreymi*



Fyrst eitt sindur um meg sjálva: Eg eri útbúgvin sjúkrasystir og vakurleikaserfrøðingur. Eigi og reki RØKTAN, sum er ein klinikk fyri krops- og andlitsrøkt.

Eg havi gjørt av at stilla upp fyri Fólkaflokkin í Suðurstreymi:

1)Tí at eg vil vera við til at ávirkað hvussu framtíð Føroya, og liviumstøðurnar hjá okkara unga ættarliði skulu myndast.

Og

2)Tí eg taki undir við stevnuskránni hjá Fólkaflokkinum, og meti tað vera besta boði uppá einar tryggar og góðar Føroyar.

Eg vil greiða eitt sindur frá sjónarmiðunum hjá Fólkaflokkinum viðvíkjandi ríkisrættarligu støðu Føroya, og okkara boð uppá hvat vit vilja á tí økinum.

Okkara aðalmál er: "AT Í FØROYUM SKULU FØROYINGAR RÁÐA.

Vit kunnu "venda tilgongdini runt "tríggjar ferðir.

Men úrslitið er tað sama, tí har stendur framvegis:

At í FØROYUM SKULU FØROYINGAR RÁÐA!

So langt kunnu flest okkara eisini vera samd, so ella so.

Okkara "koyriplanur" er: Løgtingssamtyktin um sjálvstýrið Føroya fólks.

Her er útgreina hvussu vit stig fyri stig , eftir 10-12 árum varisliga loysa okkum úr teim peningaligu bindingunum til Danmark.

Lyklaorði er varislig tillaging:

Trygd, trygd og aftur trygd.

-Hví skulu vit kvinnur blanda okkum í hesa tilgongdina???

Vit hava í fleiri øldir stýrt pengakassanum í teim føroysku heimunum, og hava royndirnar bæði uppá gott og ringt.

Tað gav at bíta í 92 tá ið tann føroyski búskapurin rapaði.

Hvør noyddist tá tað tungu gongd niður á Christiansborg fyri at fáa kreditt til føroyska samfelagið?

Jú ein kvinna mátti taka um stýrisvølin. Marita Petersen , sála, leiddi við tign og mynduleika landið ígjøgnum svárastu kreppu í nýggjari tíð.

Fyri kortum las eg tvær bøkur um økonomi. Skrivaðar av kvinnum, til kvinnur:

"Kvinde, kend din kurs" av Anne-Mette Hjalager og Jette Tybjerg.

Og "Sund Økonomi" av Lisbeth Nebelong. Í báðum bókum, sum viðgera privat-økonomi, verður dentur lagdur á at skapa tær eina tryggan búskap. Nevniliga við at minka um skuldina til tú at enda "ert harri yvir tínum egna pengapungi"

Júst soleiðis kemur "koyriplanurin": løgtingssamtyktin um sjálvstýrið Føroya fólks" at virka, um rætt verður atborið.

Lyklaorði er varislig tillaging: Trygd, trygd og aftur trygd.

Tær kvinnuligu lívsroyndirnar eru alneyðugar, og eiga so avgjørt at mynda tær stóru avgerðirnar, eisini í føroyskum politikki, og soleiðis koma øllum samfelagnum til góðar. Mennirnir skulu ikki einsamallir sleppa aftur at gera svakar økonomiskar dispositiónir fyri Føroyar, sum okkara børn so skulu svíða fyri!

So eg vil enda við at heita á tykkum kvinnur, ið ikki enn hava tikið støðu politiskt: Les stevnuskránna hjá teimum ymisku flokkunum, og tak so støðu til hvør flokksskrá passar best til tína sannføring,---- og tekna teg so sum lim í flokkinum.

Boðskapur okkara til ríkisrættarligu støðuna er stuttur og greiður:

Í FØROYUM SKULU FØROYINGAR RÁÐA!

Loysunarorði er: Varislig tillaging—Trygd, trygd og aftur trygd.

Koyriplanurin er "Sjálvsstýrissamtyktin."

# Óegnaður fiskimálaráðharri in spe

**Svend Aage Ellefsen**



Felagið Nótaskip við Atla Hansen reiðara (og vælevni sambandsfloksins til løgtingið) hevur eina – um sjálvan formannin sera avdúkandi – vælgrein í bløðunum um vikuskiftið.

Eg havi ikki áður sæð eitt áhugafelag fyri skipabólkarnar skriva valgreinar! Kanska kemur Felagið Trolskip við eini grein til fyrimunar fyri Fólkaflokkin, Felagið Línuskip fyri Javnaðarflokkin etc.

Valgreinin hjá Felagnum Nótaskip er ætlað at niðurgera sitandi landsstýrismannin í fiskivinnumálum – neyðugt verður við fiskimálaráðharra úr øðrum flokki eftir valið verður sagt.

Og tað er vælkennt millum manna, at formaðurin Atli Hansen ætlar sær sjálvum landsstýrissessin. Atli Hansen er soleiðis fiskimálaráðharri in spe (samb. Gyldendal: en som håber at blive…).

Men er tað nakað løgtingsevni, ið ikki er egnað til hetta týdningarmikla starvið, so er tað júst Atli Hansen. Bert hetta, at brúka Felagið Nótaskip í egnum valdysti, sigur jú sítt.

Øll, ið lesa, tað hann hevur sett á prent bæði nú og áður, síggja eisini greidliga, at maðurin ikki verður førur fyri at fyrisita fólksins ogn á ein heildarvinarligan og óvildugan hátt, men at hann tvørturímóti fer at lata teil egnan fyrimun og egnan skipabólk fiskikvotur, ið hesin skipabólkurin hvørki hevur uppiborið, eigur rættindi til ella megnar at fiska.

**Eiga øll nótaskipini allan svartkjaftin?**

Sjónarmið Atla er hetta einoygda og snævurskygda, at hansara egna og hini sjey nótaskipini burturav eiga allan svartkjaftin, alla sildina, alla lodnuna og allan makrelin – basta!

Tað merkir í hansara hugaheimi, at hvørt kilo av uppisjóvarfiski, ið ein komandi landsstýrismaður letur øðrum skipabólkum, t.d. flakatrolarum og rækjutrolarum at keypa kvotur fyri frá russum og norðmonnum, tað verður tikið beinleiðis frá honum sjálvum, frá hansara og øðrum nótabátum.

Tað merkir eisini fyri honum, at hvørt einasta kilo av svartkjafti, sum ídnaðarskipini ella Næraberg og/ella møguligir aðrir føroyskir (ella útlendskir?) svartkjaftatrolarar fiska, verður tikið frá honum sjálvum!

Á sama hátt viðvíkjandi sildini, lodnuni og makrelinum.

Hansara tankagongd er soleiðis heilt burturvið og verður beinleiðis samfelagsskaðilig, um hann gerst komandi landsstýrismaður í fiskivinnumálum ella fær nakrað beinleiðis ávirkan á ein komandi fiskivinnupolitikk!

**Betur skil kann fáast á!**

Skal kastast sitandi fiskimálaráðharranum nakað fyri, so er tað tvørturímóti hetta, at hann hevur hopað undan tí stóra trýstinum, sum felagið Nótaskip og Atli Hansen hava lagt á hann.

Hann hevur latið sær lindað, at tað árliga hava staðið millum 20.000 og 30.000 tons av føroyskum silda-, makrel- og lodnukvotum ófiskaðar, tá kvotuárini endaðu, tí nótaskipini hava fingið størri kvotur, enn tey megnaðu at fiska! Hann sá støðuna, men boygnaði tá nótaskipini mótmæltu, og tá ídnðarskip – millum aðrar undirritaði – bóðu um loyvi at fiska tað, ið eftir stóð!

Samfelagsliga hevur hetta kostað dýrt, og fyri teir, ið annars kundu fiska, hevur tað kennst bæði svárt og høpisleyst.

Hann hevur eisini givið seg undir trýst, og hevur tillutað nótaskipunum sild og makrel, ið av røttum áttu at verið tillutað øðrum! Hetta seinasta hevur m.a. gingið útyvir undirritaða.

Ein komandi fiskaríministari eigur við ársbyrjan ikki at útluta meira enn tveir triðingar av heildarkvotuni av uppisjóvarfiskinum til eginkvotur, so hann seinni gerst førur fyri uttan trupulleikar at lata øðrum, so øll heildarkvotan fæst til høldar.

**Eiga Atli o.a. søgulig rættindi?**

Víst eru nótaskip ímillum, ið eiga sjálvsøgd rættindi, tí tey hava fiskað nógvan svartkjaft í mong ár – ikki minst Tróndur í Gøtu, Christian í Grótinum, Krúnborg (fyrst gamla og nú nýggja).

Men hvussu Atli Hansen skal eiga nøkur søgulig rættindi til svartkjaft fram um aðrar er trupult at skilja.

Bankin tók í síni tíð "Jupiter" frá Hendrik Old og gav Atla Hansen skipið at reka. Men mær vitandi drap hann ikki ein einasta svartkjaft øll árini, hann hevði hetta skipið – ikki ein!

Og nú skal so hann, sum fyri nøkrum krákumánaðum síðani keypir eitt nakað størri skip, alt í einum eiga allan stovnin?

Og hvussu við øðrum nótaskipum, sum heldur ikki nakrantíð (ella í mannaminni) hava fiskað svartkjaft? Hví skulu teir eiga so øgiligan svartkjaft frammum onnur føroysk skip? Hvussu við Norðborg, Saksabergi og Finni Fríða t.d.?

Eg havi roynt at hugt í "Lóg um vinnuligan fiskiskap", men dugi satt at siga við mínum besta vilja ikki at síggja ein bókstav, ið bendir rættindunum á teirra borð!

Felagið Nótaskip sigur seg fara at leggja sak um fiskirættindi. Vælsignaðir geri teir tað sum skjótast, tí tá fáa vit staðfest med alla, at nótaskipini leingi hava fingið meira enn tey av røttum hava uppiborið.

# Ríkisfelagskapur = bygdamenning! Fullveldi = miðsavnan!

**Páll Poulsen, Kollafjørður**
*Valevni sambandsfloksins í Norðstreymoy*



Fullvelstisstuðlanir leggja stóran dent á at nýta grannalandið Ísland sum fyrimynd, um Føroyar gerast eitt fullveldi. Men, fólk í útjaðaraøkjunum í Føroyum, kunnu eisini nýta Ìsland sum eina ræðumynd, um tey ætla sær at velja loysingarflokjkarnar! Tí um bústaðarmynstrið í Ìslandi skal verða fyrimyndin fyri einum føroyskum fullveldi, so hevur útjaðarin í Føroyum onki gott í vænti. Í Føroyum býr umleið ein triðingur av fólkinum í høvusstaðnum. Í Íslandi búgva tveir triðingar av landsins íbúgvum í høvusstaðnum.

Uttan mun til hvat vit annars halda um ríkisveitingina, so eru øll samd um, at tað er orsaka av ríkisveitingini (blokkinum), at Føroyar í dag hava eitt livistøði, ið er ájavnt við hini Norðurlondini. Tað er heilt greitt orsaka av ríkisveitingini, at vit hava megnað at ment samferðslukervið til frama fyri útjagaraøkjini, og at vit - til dømis - hava, framhaldsskúlar, sjúkrahús og røktarheim í Suðuroynni og í Norðuroyggjum.

Tað eru tey, ið harmast um, at vit ikki fingu fullveldið beinanvegin aftaná nógv umrøddu fólkaatkvøðuna 14. septembur. Ja, kannska ? Men um so var, at vit høvdu fingið fullveldi tá, so vóru ongir útoyggjaveljarar í dag! Búðu nú eini 25 túsund fólk í Føroyum, og 15 túsund av teimum helst í Tórshavn, so vóru Føroyar ikki tað framkomna landið tær eru í dag - gamla Dronning Alexandrines Hospital hevði framvegis hokið úti í Sandagerði, og fróðskaparsetur, miðnámsskúlar, norðurlandahús, Smyrlar, tyrlur, vegir, brýr, berghol og undirsjóvartunnlar, høvdu bara funnist í hugaheiminum hjá einum doyggjandi ættarliði av fullveldisfólkum.

Uttan ríkisveitingina, sum eina trygga inntøku í upp- og niðurgangstíðum hevði ein rættuliga stórur partur av teimum stovnum og tænastum, vit í dag rokna sum ein sjálvfylgja, ikki verið ein veruleiki. Eitt annað er so, um vit altíð hava sýnt ríkisveitingini virðing, og nýtt hana rætt! Tað kunnu vit ikki lasta dønum, men bara okkum sjálvum!

Sambandsflokkurin fer at gera alt fyri at útjagarin og bygdamenningin ikki verður offrað á fullveldisaltarnum! Og tí velja Norðstreymoyingar, sum eina sjálvfylgju SAMBANDSFLOKKIN.



UTTAN ÚR HEIMI

Búskapur og vinna:

## Snøhvit steðgað

Stóra norska verkætlanin um at útvinna gass á einari leið úti fyri Norðurnoregi og at viðgera gassið á einum risastórum verki uttan fyri Hammerfest er brádliga komin í vanda. Tað hendi, tá eftirlitsstovnurin hjá EFTA, ESA, boðaði norsku myndugleikunum frá, at verkætlanin eftir øllum at døma er í stríð við galdandi reglur í EBS-samstarvinum. ESA sigur, at verkætlanin er ólóglig, tí hon er m. a. grundað er serliga lagaligar skattareglur, og tað tulkar stovnurin sum eitt slag av fjaldum almennum stuðuli, sum er ólógligur.

Brævið frá ESA kom sum ein skelkur á norsku myndugleikarnar og feløgini, sum eru við í verkætlanini, og á kreppufundi hóskvøldið varð avgjørt at útseta ætlanina fyribils.

## Valdi Aarhus

Bingjureiðaríið hjá A. P. Møller, Maersk Sealand, hevur valt at nýta havnina í Aarhuss sum fast samband í rutusiglingini millum Evropa og Fjareystur. Avgerðin ber í sær, at heimsins størstu bingjuskip fara at leggja at í Aarhus hvønn leygardag frá 25. mai. Havnin í Aarhus hevur gjørt íløgur fyri 550 mió. krónur í eina nýggja bingjuhavn, og A. P. Møller hevur sjálvt gjørt íløgur fyri einar 250 mió. krónur í eina nýggja bingjumiðstøð á havnarlagnum.

## Einki bonus

Stjórin í Statoil, Olav Fjell, fær onga eyka samsýning fyri tað góða úrslitið, sum felagið hevði í fjør. Fyri skatt hevði Statoil 56,2 mia. norskar krónur í avlopi, og tað er met. Starvsfólkini hava fingið 10.000 krónur sum bonus afturfyri, men stjórin fær einki. Hann fær framman-undan 3,5 mió. norskar krónur í løn um árið.

# Umhugsa at krevja Ísrael eftir endurgjaldi

**Ísraelski herurin hevur oyðilagt fleiri bygningar, sum ST hevur bygt í teimum palestinsku økjunum**

MIÐEYSTUR

*Árni Joensen*

ST umhugsar nú at krevja, at Ísrael skal rinda endurgjald fyri skaða, sum ísraelski herurin og flogvápnið hava gjørt í teimum palestinsku flóttafólkalegunum.

Flóttafólkafelagsskapurin hjá ST, sum tekur sær av áhugamálunum hjá teimum palestinsku flóttafólkunum, UNRWA, sigur, at tað fer at kosta einar 30 milliónir krónur at umvæla skaðan, sum ísraelsku álopini hava gjørt. Her verður hugsað um álopini á tær palestinsku flóttafólkalegurnar og bumbuálopini á Gazabý fyrr í hesum mánaðinum.

ST sigur, at ísraelsku álopini hava gjørt stóran skaða á 22 skúlar, fýra læknastovur, fýra tænastumiðstøðir og 141 flóttafólkaheim. Tveir sjúkrabilar hjá UNRWA vórðu eisini oyðilagdir í ísraelsku álopunum.

Leiðslan í UNRWA sigur, at tað er ikki annað enn rílíligt, at Ísrael rindar endurgjald fyri skaðarnar.

# Castro heim í skundi

**Kubanski forsetin, Fidel Castro, mátti í gjár skunda sær til hús av ST-menningarráðstevnuni í Meksiko**

KUBA

*Árni Joensen*



*Kubanski forsetin, Fidel Castro, tosar við forvitin tíðindafólk, eftir at hann hevði boðað frá, at hann mátti skunda sær til hús*

*Mynd: Reuters*

Kubanski forsetin, Fidel Castro, hevur hesa vikuna verið millum luttakararnar á teirri serligu menningarráðstevnuni, sum ST hevur skipað fyri í meksikanska býnum Monterey. Men í gjár boðaði hann brádliga frá, at hann noyddist at skunda sær aftur til Havanna.

Castro vildi ikki siga, hví hann hevði slíkan skund at fara til hús, men á einum tíðindafundi segði hann bert, at talan var um eina "serliga orsøk". Eygleiðarar í Monterrey siga seg ikki hava hoyrt, at nakað óvanligt er hent í Havanna, meðan forsetin hevur verið uttanlands.

Amerikanski forsetin, George W. Bush, kom til Monterrey hósdagin og skuldi halda røðu, beint áðrenn Castro fór haðani. Tað er óvist, at kubanski forsetin valdi at fara til hús, tí hann hevði ongan áhuga í at taka lut á einari ráðstevnu saman við amerikanska forsetanum.

# Vil hava meiri pengar til stríðið ímóti yvirgangi

**Stríðið ímóti altjóða yvirgangi kostar amerikanska ríkiskassanum meiri enn higartil hildið**

YVIRGANGUR

*Árni Joensen*

Amerikanski forsetin, George W. Bush, vil hava meiri pengar til at fíggja bardagan ímóti altjóða yvirgangi.

Forsetin sigur, at tað er neyðugt við einari eykajáttan, og hann hevur tí biðið kongressina játta stjórnini 27,1 milliardir dollarar afturat. Pengarnir skulu nýtast til krígsførsluna í Afghanistan og onnur hernaðarlig tiltøk, sum forsetin tekur til. Í umsóknini ger forsetin eisini vart við, at tað er neyðugt, at málið fær skjóta viðgerð, tí tørvur er á pengunum beinanvegin.

Í umsóknini til kongressina sigur Bush, at ætlanin er at nýta ein minni part av pengunum til tiltøk ímóti yvirgangi í sjálvum USA. M. a. er ætlanin at útbyggja trygdarskipanirnar í floghavnunum og at styrkja vaktarhaldið á amerikanska markinum.

Úr Norðurlondum:

## Mundi dottið niður

Eitt flogfar hjá íslendska flogfelagnum Icelandair mundi dottið niður í Gardermoenfloghavnini í Oslo tann 22. januar.

Flogfarið var í ferð við at seta seg umm 11-tíðina fyrrapartin, men flogskiparin gjørdi av at taka flogfarið uppaftur og at royna eina ferð afturat. Kanningar hava avdúkað, at flogfarið helti 49 stig, tá tað var á veg niður ímóti vøllinum, og at tað helti 37 stig, tá tað fór uppaftur. Somuleiðis hava kanningarnar avdúkað, at flogfarið var bara 98 metrar oman fyri flogbreytina, tá tað snaraði uppaftur.

Tað hevur eisini víst seg, at fleiri av tólunum í flogfarinum vóru í ólagi, tá flogfarið fór á flog í Íslandi við kós ímóti Oslo. 82 fólk vóru í Boeing757-flogfarinum.

## So fall dómur

Seinnapartin hósdagin fakk dómur í tí nógv umrødda Orderud-málinum í Noregi. Í málinum vóru fýra fólk ákærd fyri medvirkan til morð, eftir at trý fólk vórðu funnin myrd á bóndagarðinum Orderud í 1999. Nevningarnir dømdu hósdagin øll fýra sek í at hava medvirkað til morðini, og í gjár kravdi ákæruvaldið, at tey skulu fáa lógarinnar harðastu revsing, sum í Noregi er 21 ára fongsul. Tann ósvaraði spurningurin í málinum er framvegis, hvør helt skammbyrsuni, sum drapt tey trý fólkini.

## Meiri løn

Í Danmark hevur semingsstovnurin sett fram eitt semingsuppskot í sátttmálatrætuni millum kommunurnar og amtini øðrumegin og fakfeløgini hjá teimum umleið 650.000, sum arbeiða hjá kommunum og amtum. Eftir semingsuppskotinum verður komandi sáttmálin galdandi í trý ár, og starvsfólkini fáa í hesum tíðarskeiði 5,5 prosent afturat í løn umframt tveir frídagar afturat. Liminnir í feløgunum skulu nú taka støðu til uppskotið.